# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



1. september fingu Jóhanna Restorff og Jan Jóanesarson, búsitandi í Århus, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3680 gr.



29. august bleiv hendan lítla gentan fødd á Glostrup sjúkrahúsi. Hon var 54 cm. long og vigaði 3960 gr. Foreldrini eru Ditte Karina Letes og Gunnar H. Thomsen, Kastrup.

1. september fingu Guðrið E. Johansen og Marner Nolsøe, Keypmannahavn eina dóttur. Hon var 53 cm. long ov vigaði 3400 gr.

11. september fingu Vivi Jacobsen og Signar Petersen, Frederikshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4320 gr.

12. september fingu Vígdis Jacobsen og Fróði Andersen, Vágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4140 gr.

14. september fingu Óluva Samuelsen og Virgar Fagraklett, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3800 gr.

15. september fingu Armgarð og Atli Godtfred, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3925 gr.

15. september fingu Kirstin Ellingsgaard og Bjarni í Sjúrðargarði, Kaldbak, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3870 gr.

16. september fingu Saloma Jóhannesen og Rúni Petersen, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4250 gr.

17. september fingu Anna Krog Mortensen og Virgar Hentze, Sandi, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3300 gr.

17. september fingu Bergitta Simonsen og Allin Simonsen, Sandur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3400 gr.

17. september fingu Tóra og Edvard á Hólalagnum, Leirvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3150 gr.

17. september fingu Paula í Giljum og Petur í Gong, Tórshavn, ein son. Hann var 47 cm. langur og vigaði 2420 gr.

18. september fingu Mary Zachariassen, Streymnes og Esmar Eiðisgarð, Eiði, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3330 gr.

19. september fingu Selma Ranghamar og Jóannes Kjølbro, Doha, Qatar, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 4080 gr.

19. september fingu Herdis B. Simonsen og Jón Simonsen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3350 gr.

19. september fingu Ann Vang og Heri Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4100 gr.

20. september fingu Debora Hjelm og Niels Nielsen, Sørvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4700 gr.

20. september fingu Dúrita og Dánial Petur Hansen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

20. september fingu Anita Ottosen og Esben H. Debess, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 58 cm. long og vigaði 4700 gr.

21. september fingu Kerstin Rasmussen og Pætur Johansen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4300 gr.

21. september fingu Laila og Sámal av Reyni, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3700 gr.

# Finnbogi Ísakson



Tað er longu nógv skrivað um Finnboga, nú hann er farin. Vit gjørdust vinmenn á ungum árum og varðveittu sambandið alt lívið. Vóru vit frá hvørjumøðrum, skrivaðu vit ofta saman. Honum dámdi at skriva, og tað var altíð hugaligt at fáa brøv frá honum, tí hann var góður brævskrivari, og brøvini vóru ein stuttligur vavstur av álvarsemi og skemti, túnatosi og hvøssum viðmerkingum.

Nú verður hann fyrst og fremst umtalaður sum politikarin, og tað er natúrligt, tí politikkinum ofraði hann ein stóran part av sínum lívi. Eg var staddur í Onglandi í 1966, tá hann skrivaði til mín, at hann hevði fingið áheitan frá tjóðveldismonnum í Klaksvík um at stilla upp til løgtingsvalið. Hvat heldur tú? spurdi hann.

Onkuntíð havi eg hugsað um, hvussu alt mundi havt lagað seg, um hann lurtaði eftir mínum ráðum. Tað gjørdi hann ikki, og tað hevði eg kanska heldur ikki væntað. Ambitiónirnar hevði hann, og hann hevði longu gjørt sær so mikið av tankum um hesa áheitan, at avgerðin hálvavegna mundi vera tikin.

Men Finnbogi var gávuríkur á so mangan hátt og kundi havt gjørt meira vart við seg á øðrum økjum. Tað lá væl fyri hjá honum at skriva, og sum øll vita, hevur hann lagt nógv skrivligt eftir seg. Tey eru kanska færri, sum vita, at hann var kringari enn tey flestu á bundnum máli eisini. Tí er tað spell, at einastu yrkingar frá hansara hond, ið eru kendar, er onkur barnayrking og tættirnir, sum flestir vórðu yrktir til V-4 sendingar í útvarpinum. Til aðrar yrkingar setti hann strangari krøv enn til tættirnar, ið vórðu gjørdir til løtuna. Tí komu tær ikki fram, og nógv av tí, hann hevur gjørt, er allarhelst ikki til longur. Nakað týddi hann úr øðrum málum, og tað, sum hann annars skrivaði av hesum slag, var mest í traditionellum stíli, ávirkað av yrkjarum, ið hugtóku hann á ungum árum. Mín meting var, at hann hevði havt evnir at skapa sín egna stíl, um hann helt fram. Men á hesum øki var hann vandin, og sum frá leið bleiv tað so nógv annað, ið kravdi hansara arbeiðsorku.

Sum blaðungur sendi hann viðhvørt onkra yrking til vinmannin í Klaksvík, Símun Hansen, blaðstjóra á Norðlýsinum. Tann fitti barnasangurin "Far lítli útum", sum hvørt mansbørn í dag kennir, hevði sum so mangt annað verið farin í gloymskuna, um ikki Sámal Petersen loftaði honum. Símun og Sámal vóru báðir lærarar í Klaksvík, og ein dagin vildi Sámal vita, hvør ið hevði yrkt hasa barnarímuna, sum stóð í Norðlýsinum. Símun svaraði ikki beinanvegin, so Sámal lat hann vita, hví hann spurdi. Hann hevði gjørt eitt lag til sangin. Og soleiðis bar tað til, at Finnbogi ein dagin fær bræv frá Sámali við lagnum. Eg minnist, tá vit fyrstu ferð hoyrdu tað spælt, eitt lætt og vakurt lag. Meira hendi ikki í fyrstu atløgu. Finnbogi, sum innast inni als ikki var tann framligi, gjørdi einki fyri at fáa sangin fram. Ikki fyrr enn Sámal fór at ótolnast, bleiv hann tikin upp til eina barnasending í útvarpinum.

Tann, sum hevði við Finnboga at gera, kundi ikki altíð vera samdur við hann. Hann treivst í andgletti, ikki legði hann fingrarnar ímillum, og hann kundi arga og provokera, onkuntíð meira enn gott var. Av lyndi var hann soleiðis, at hann aldi ikki fólk uppat sær. Tað legði hann heldur einki í. Men tað hoyrir við til myndina av honum, at kundi hann vera harður við ein persón, tá teir stóðu andlit til andlit, so firnaðist hann ikki fyri, tá hin vendi ryggin til, at verja sama persón, um onnur komu við atfinningum, so hann ikki tók undir við.

Finnbogi var arbeiðssamur, og nú hann ikki longur var aktivur politikari, hevði hann ætlanir, sum hann ikki fekk framt. Tað var spell, tí hann var í mong ár við, har avgerðir vórðu tiknar, og hann var góður eygleiðari í málum, sum høvdu hansara áhuga.

Seinastu ferð vit prátaðu saman, segði hann sum so ofta „kom skjótt aftur". Eg helt meg vera skjótan aftur - hóast tú altíð kanst spyrja, hvat er skjótt, ikki minst tá ið tað, sum eftir er av lívinum, ikki longur telist í mánaðum ella vikum, men í døgum og tímum - men tá varð ikki meira prátað. Var røddin farin, so var handatakið fast og segði nógv uttan orð. Eg veit, hvat lá í tí, og tað fer at fylgja mær sum eitt fjálgt minni um ein trúgvan vin.

**Árni Absalonsen**

# Fríðrikur Bláhamar 40 ár

Í dag skal hann giftast, og týsdagin 27. september fyllir hann 40 ár. Talan er um stjóran á dekkfyritøkuni Super Dekk í Havn, Fríðrik Bláhamar.

Fríðrikur, sum tey fyrstu 11 árini av lívi sínum búði í Vestmanna, er so at siga uppvaksin við dekkum. Pápin stovnaði dekkfyritøkuna Super Dekk Service fyrst í 70-unum, og Fríðrikur hevur arbeitt við dekkum stóran part av lívinum.

Í 1982 gekk hann á háskúla í Havn, og á Føroya Handilsskúla í 1984. Hann koyrdi lastbil eitt tíðarskeið og lærdi til bilmekanikara hjá Ivan Johansen Bilum frá 1984 til 1989. Eftir at hava koyrt býbuss í góð tvey ár byrjaði hann í føstum starvi á Super Dekk Service í 1991.

Í 1995 yvirtók hann fyritøkuna og gjørdi eitt nýtt felag, Sp/f Super Dekk.

Hann gongur upp í fyritøkuna við lív og sál og leggur seg ofta út í orðaskiftið í fjølmiðlunum, tá tað snýr seg um vetrardekk, summardekk ella mynsturdýpdina á dekkum.

Hann er eisini eitt náttúrumenniskja, og hann gongur nógv í haganum, bæði einsamallur og saman við øðrum.

Fríðrikur er elstur av teimum trimum børnunum hjá Tórhardu, f. Ejdesgaard, og Sámal Bláhamar í Havn. Hini systkini eru Brynhild og Regin.



Í dag, leygardagin 24. september, giftist Fríðrikur við Jacquelinu Nielsen, dóttir Jonnu og Niels Jacob Nielsen á Strondum. Fríðrikur og Jacquelina hittust fyrstu ferð, tá tey gingu á háskúla saman fyri meira enn 20 árum síðan. Tey eiga børnini: Sámal, Jonnu og Teresu. Fríðrikur eigur eisini sonin Karl Marius.